# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fýra kavarar aftrat




*Bjargingarkavara eftir seinastu royndina í sjónum, útfyri Norðoyri leygardagin. Luttakarar frá vinstru: Janus Joensen (Instruktør), Eli A. Borgarklett, Klaksvík; Bergur F. Mikladal, Klaksvík; Sára Winther, Vágur og Sólbjørn Sakarisson, Kunoy*

Leygardagin fingu fýra næmingar prógv sum bjargingarkavara, frá kavaraskúlanum Faroe Dive í Klaksvík. Bjargingarkavarinir hava í januar mánaði ognað sær servitan innan økini bjarging og fyribyrging av vandastøðum í sjónum. Undirvíst hevur verið bæði í ástøði og venjingum í sjónum.

# Tað grør um gangandi fót

**Tað fríðkast í hvørjum Úti í Grøv – Býargartnarin er farin at rigga til, nú várið kemur**

NÁTTÚRA

**Kalksvík:** Nógv er plantað seinastu árini og gjørt til at fríðka um Úti í Grøv uttanfyri Klaksvík. Ein góð gøta er gjørd norðanfyri ánna og longur uppi er ein snotislig brúgv gjørd.

Nú er býargartnarin farin í holtur við eina gøtu sunnanfyri ánna, og so aftur eina brúgv longur uppi í ánni, so tað slepst yvir um, skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar Kommunu.

Alt økið er frá náttúrunar hond vakurt og serskilt – Økið kann eisini siga frá søgum undir krígnum, tá ið nógv fólk búið her úti. Men nú hava góðar gøtur og vakur vøkstur lagt lunnar undir eitt romantiskt og heilsugott økið, har friðsælan bert verður brotin av tíni vælveru.

Býargartnarin tráddi sínar barnaskógvar her saman við abba sínum Hans Jacob Joensen táverandi býargartnara, sum hevði ein serligan alsk til økið. Hans Hjalti Skaale, sum nú er býargartnari, hevur tikið tráðin upp eftir abba sín, og tí kunnu vit í næstum njóta enn meira gott av skilagóða og hegnisliga arbeiði hansara, verður sagt á www.klaksvik.fo



*Tað fríðkast í hvørjum Úti í Grøv uttan fyri Klaksvík*

**ave**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hákun Joensen, Saltangará**, vanliga nevndur Hákun á Líknagøtu, andaðist í heiminum 30. januar, 73 ára gamal. Kistan fer úr heiminum í Glyvra kirkju í kvøld, týskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13.

**Elsa Purkhús, Klaksvík**, ættað úr Mikladali andaðist mánadagin 30. januar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 93 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Mads Andreas Winther Hentze**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Poul Færø fyri troystarrík orð í kapellinum.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravarar og tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferð og ervi.
Tøkk til heimahjálpararnar.
Tøkk til Sølvi Mortensen fyri taluna.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir, og tøkk til tykkum øll, ið ringdu og komu inn á gólvið.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga tøkk øll somul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jenny**

**Dagurin í morgin**
**1. februar. Brigida**, deyð ár 523. Henda franska halgikvinna stovnaði kleystur í Kildare, og er í Írlandi líka høgt í metum sum sjálvur Pátrikur, sum var ápostul Írlands. Sama navnið sum tey føroysku Birita ogBrita. Upprunaliga keltiskt navn, sum merkir hin høga ella ljómandi.

